# Fingu bjóðað Degnshús væl bíligari



*Fyri viku síðani keypti Tórshavnar Býráð Degnshús fyri fimm milliónir krónur. Fyri fýra árum síðani fekk býráðið bjóða at keypa húsini, men lat ikki við seg koma. Stutt eftir blivu húsini seld fyri 1,8 millión, sum helst eisini hevði verið keypsprísurin hjá Tórshavnar Býráð, um teir tóku av tilboðnum í 2001*

*savnsmynd*

**Fyri fýra árum síðani fekk Tórshavnar Býráð tilboð um at keypa Degnshús av táverandi eigara, Brandur í Dali, sum seinni seldi Petur Olsen húsini fyri 1,8 millión krónur. Hóast býráðið fekk skrivligt tilboð um at keypa húsini, hoyrdi táverandi eigari einki aftur**

DEGNSHÚS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Áðrenn Brandur í Dali í 2001 seldi Peturi Olsen húsini, bjóðaði hann øllum almennum stovnum at keypa húsini. Millum teirra, sum fekk tilboðið um at keypa húsini, var Tórshavnar Býráð og Jan Christiansen, táverandi borgarstjóri.

### Eingin lat við seg koma

- Eg sendi eitt fax út til allar almennar stovnar í høvuðsstaðnum, har eg bjóðaði teimum at keypa húsini. Eg nevndi ongan prís, men tá ið eg nú seldi Petur Olsen tey fyri 1,8 millión, so hevði tað eisini borið til hjá Tòrshavnar Býráð at keypt tey fyri somu upphædd tá, sigur Brandur í Dali.

Hann sigur, at ongin av almennu stovnunum, heldur ikki Tórshavnar Býráð, sum fekk tilboð um at keypa húsini, lat við seg koma, og tí vóru húsini seld privat.

Petur Olsen keypti síðani húsini fyri 1,8 millión krónur, og í farnu viku keypti Tórshavnar Býráð so húsini fyri 5 milliónir. Tað vil siga, at um býráðið hevði keypt Degnshús frá Brandi í Dali í 2001 fyri 1,8 millión, so vóru fleiri enn tríggjar milliónir spardar. Men býráðið lat ikki við seg koma í 2001, og ístaðin vóru húsini keypt fýra ár seinni fyri fimm milliónir krónur.

Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri:

## - Tað minnist eg einki til



*Jan Christiansen, sum var borgarstjóri í Havn í 2001, tá ið býráðið fekk tilboð frá táverandi eigara av Degnshúsi um at keypa ognina fyri væl minni, enn býráðið nú hevur keypt tey fyri. Hann sigur seg einki minnast til tilboðið um Degnshús.*

*savnsmynd*

**Fyrrverandi borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, sum sat við róðrið, tá ið býráðið fekk tilboð um at keypa Degnshús í 2001, sigur seg einki minnast til tilboðið um at keypa húsini**

DEGNSHÚS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá Tórshavnar Kommuna í 2001 fekk tilboð um at keypa Degnshús frá Brandi í Dal, var tilboðið sent til Jan Christiansen, táverandi borgarstjóra. Jan Christiansen, sum nú situr í minnilutanum í Tórshavnar Býráð, sigur seg einki minnist til skrivið frá Brandi í Dali.

- Hatta skriv, sum tú nevnir har, minnist eg einki til, og eg veit meg ikki hava sæð tað. Um eg hevði sæð tað, so hevði eg ivaleyst tikið tað upp í samgonguni ella beint tað í nevnd til viðgerðar, sigur Jan Christiansen.

### Ikki býráðsuppgáva at keypa miðbýin

Tó heldur Jan Chrisitiansen, at tað neyvan hevði broytt so nógv, um hann hevði sæð tað, tí tað hevði neyvan havt við sær, at býráðið hevði keypt húsini, sigur hann.

- Hugburðurin hjá fyrrverandi samgongu var tann, at tað ikki var ein býráðsuppgáva at keypa ognir í miðbýnum, og tí høvdu vit neyvan gjørt nakað við málið, sigur Jan Christiansen.

Sjálvur heldur Jan Christiansen, at skrivið frá Brandi í Dali við tilboðnum um at keypa Degnshús í 2001 kann verða endað í byggideildini, s um ikki hevur mett tað verið áhugavert at farið víðari við málinum.

Heðin Mortensen, borgarstjóri:

## - Onkur hevur sovið í tímanum

**Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, skilur ikki, at Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri, leikar so nógv í um keypið av Degnshúsi, tá ið hann sjálvur hevði møguleikan at keypa húsini væl bíligari fyri nøkrum árum síðani, men tók ikki av**

DEGNSHÚS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið Sosialurin mánamorgunin greiddi Heðin Mortensen, borgarstjóra, frá, at fyrrverandi eigari av Degnshusi í 2001 bjóðaði Tórshavnar Kommunu og táverandi borgarstjóra, Jan Christiansen, at keypa Degnshús, uttan at býráðið lat við seg koma, kom hetta ikki óvart á Heðin Mortensen.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sigur seg ikki skilja, at Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri, leikar soleiðis í, nú býráðið hevur keypt Degnshús fyri fimm milliónir, tá ið hann sjálvur kundi havt tryggjað býráðnum ognina væl bíligari fyri fýra árum síðani.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Sama søga

- Eg skilji ikki, at Jan Christiansen leikar so nógv í nú, tá ið hann sjálvur hevði møguleikan at keypa húsini væl bíligari fyri nøkrum árum síðani. Fyri mær tykist tað sum um, at onkur hevur sovið í tímanum, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjorin sigur, at hetta mál er enn eitt dømi um, at núverandi samgonga skal taka upp eftir undanfarnu.

- Hetta er sama søga umaftur. Vit, sum nú sita við róðrið, noyðast at taka upp í suppuni eftir undanfarnu samgongu, sigur Heðin Mortensen.